**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Trolroyndir. Túrur nr. 0704**
**Tíðarskeið 07/02-14/02-2007**

---

**Fólk frá FRS.:** Fróði B. Skúvadal, Kristian Zachariasen og Helke Hoyer

**Ábyrgd:** Fróði B. Skúvadal

**Endamál :** Endamálið við túrinum var at royna ymiska útgerð at máta gjøgnumstreyming, geometri og hvussu fiskur ber seg at í einum flótitroli.

**Reiðskapur:** Flótitrol Vonin 640, 16 m meskar framman og 45-50 mm meskar í posanum, lemmar, breitlar og veirar, sum vanliga verða brúktir til flótitrol, uppsamlingsposar at seta á trolið ymsastaðni. Undirsjóvar-upptøkutól, streymmátara workhorse sentinel, digitalar streymmátarar. Troleygað og netsondan verða ætlandi brúkt sum vanligt og til at kanna, hvussu geometriin á trolinum er.

**Um túrin:** Fóru av Havnini t.08.02.07 kl. 2100. Sigldu suðureftir móti Munkagrunninum. Kastaðu í útsynningskantinum á Munkagrunninum í lýsingini t.09.02.07 Fyrsta tóvið gekst væl, streymmátarin (ADCPin) og kamera sótu á høvuðlínini. Annað tóvið varð um middagsleitið t.09.02.07. Hetta tóvið gekst minni væl. Eitt flot á ADCPini vavdi seg inn í meskarnar har frammi og skræddi nakrar stroppar. Vit fóru inn á Fuglafjørð at bøta trolið. Fóru av Fuglafirði t. 10.02.07 um trítíðina og sigldu út á Fugloyarbankan. Har gjørdu vit 9 tóv. Á tí eina tóvinum mistu vit sambandið við netsonduna. Hon varð tikin upp og staðfest varð, at leyst samband var við kápulin. Sondan bleiv skift út og furuno-sondan nýtt í staðin. Tað var sjaskveður allan túrin, og fleiri tóv máttu avlýsast vegna veður. Mátingarnar riggaðu væl, fyribils sær tað út til at ADCPin kundi brúkast í einum troli at máta streymferð. Miniloggararnir riggaðu ikki serliga væl, av tí at óvissan var ov stór. Teir digitalu streymmátararnir góvu ábendingar um, hvussu miðalstreymferðin varð í einum punkti í trolinum. Tað gekst ikki so væl at fáa undirsjóvarupptøkur. Tað vóru ymiskir trupulleikar Vit vóru aftur á Havnini mikumorgunin t. 14.02.07 kl. 0400.

**Prøvataking:** Umboðandi nøgdir av teimum svartkjaftum, sum vóru í posanum blivu mátaðir og vigaðir, og kyn varð eisini kannað. Profilar av sjógvferð vóru tiknar inni í trolinum fyri hvørt tóv. Vit høvdu vanliga 20 cm. ímillum løgini.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Prøvarnir verða upparbeiddir í vetur.

**Fyribils úrslit ella endalig úrslit:** Vit gjørdu 11 tóv á túrinum, harav vóru 9 væleydnaði. Fyribils sær tað út til, at steymferðin er jøvn og at tað ikki er nakar turbulensur inni í trolinum. Vit mátaðu á fimm ymiskum plássum í trolinum, so at vit fingu ein hampuligan skurð ígjøgnum trolið.

**Viðmerkingar:** Tað varð lítið og einki at fáa, tvær kurvar av svartkjafti var tað mesta, vit fingu. Annars var nakað av nebbasild í onkuntíð. Lógu bakk nakrar nætur.

15-02-07 ______________________
Fróði B. Skúvadal

,

**Dømi um streymmátingar gjørdar í flótitrolinum hjá Magnus Heinason t. 11.02.07 á Føroyaleiðini.**

Fjórða tov, streymmátarin situr á 400 mm meskunum. Tað sær út til at streymferðin er minni úti við netið, og mest inni í miðuni á hesum partinum av trolinum.

Vit síggja ein skurð ígjøgnum trolið uttast til vinstru. Tað reyða er streymferð, meðan tað bláa er kósin á streyminum. Tað litaða til høgru er ein profilur av streyminum. Grønt er um 2,5 míl. Tað svarta økið er har, sum mátarin ikki fekk mátað. Hetta passar væl við, at tað er netið, sum mátarin hevur rakt. Tann niðasta kurvan er, hvussu mátarin stendur í mun til vatnrætt. Roll er síðuvegis og pitch er aftur og fram.




**Mynd 1.** Profilur av streymferðini inn í trolinum, og streymmátingar inni í trolinum.




**Mynd 2.** Tovini sum vit gjørdu, tvey sunnanfyri og restina norðanfyri og í ein landnyrðing úr Føroyum.

**Talva 1.** Vísir hvar og hvussu mátingar eru gjørdar, umframt hvar uppsamlingsposar vóru ásettir og hvat var í teimum og í posanum.

| Tov nr. | ADCP | Upps. posar | Kamera | Nøgd í upps.P. (Kg) | Veiða (Kg) |
|---|---|---|---|---|---|
| Tov 1 | Á Høvuðl. | Á 200 mm x 2 (KP) | Á Høvuðl. | 0,322 (krl.,smáf.) | 2,27 (20) |
| Tov 2 | Á Høvuðl. | Á 200mm x 2 (KP) | ------------- | Einki í | Einki í |
| Tov 3 | Á Høvuðl. | Á 200mm x 2 (KP) | Forlongilsi | 0,564 (krl., 1 sv.kjaft) | 23,310 (115) |
| Tov 4 | 400 mm. # | Á 4 m # x 2 (26) | Forlongilsi | Einki í | 6,465 (55) |
| Tov 5 | 400 mm. # | Á 4 m # x 2 (26) | Forlongilsi | Einki í | Einki í |
| Tov 6 | 400 mm. # | Á 4 m # x 2 (26) | 400 mm # | 0,316 (2 sv. Kjaft) | 5,120 (31) |
| Tov 7 | 1 m. # | Á 4 m # x 2 (26) | ------------- | Einki í | 6,495 (51) |
| Tov 8 | 1 m. # | Á 4 m # x 2 (26) | 200 mm # | Einki í | Einki í |
| Tov 9 | 1 m. # | Á 4 m # x 2 (26) og á 2 m # x 2 (26) | ------------- | 0,028 (1 sv. Kjaftur í posunum á 2 m #) | Einki í |
| Tov 10 | 4 m # | Á 4 m # x 2 (26) og á 2 m # x 2 (26) | ------------- | Einki í | Einki í |
| Tov 11 | 4 m # | Á 4 m # x 2 (26) | Inni í posanum | Einki í | Fáir sv. kjaftar |

Krillposar (KP)

26 mm meskar (26)

Tað sum stendur í klombrum í seinastu kolonnuni er samlað tal av svartkjafti. Tað sum stendur í klombrum í næsatseinastu kolonnuni eru svartkjaftar sum vóru í uppsamlingsposunum.

Svartkjaftur var í uppsamlingsposunum, bæði tá ið teir sótu á 200 mm #, 2 m # og á 4 m #. Hetta gevur ábendingar um, at fiskur fer út ígjøgnum teir stóru meskarnar í einum flótitrolið. Tað vóru samanlagt 4 svartkjaftar í uppsamlingsposunum.




**Mynd 3**. Skitsa av, hvar vit høvdu uppsamlingsposar á túrinum.